## DAGSINS MEINING

# Almenni bygnaðurin

Javnaðarflokkurin hevði í síni valskrá nevnt, at almenni bygnaðurin skuldi endurskoðast, soleiðis at borgarans tænasta skuldi betrast. Hetta var eftir øllum at døma ikki eitt stórt evni í valstríðnum.

Nú samgongan tykist verða í pottinum verður spennandi at síggja, um nakað fer at verða gjørt á hesum øki, ella um man bert fer at lata standa til, sum man hevur gjørt seinastu 4 árini.

Fólkaflokkurin er kendur fyri at kritisera tað almenna pr. automatikk uppundir hvørt val, men ongantíð fyrr er almenni bygnaðurin øktur so nógv í vavi sum undir Annfinn Kallsberg sum løgmanni. Ein endurskoðan nýtist ikki at merkja kollveltandi broytingar, men tað er ein sannroynd, at almennu bygnaðurin er til fyri borgaran og ikki øvugt.

Centraliseringin, ið er farin fram seinastu árini tekur avgerðirnar longur og longur burtur frá borgarnum. Almennir stovnar hava mist heimildir, og avgerðir, ið áttu at verið operationellar, verða flutt í stýrini. Gamaní tað hava verið einstøk dømi um, at menn hava lagt øki út aftur á stovnar, trupulleikin er bert tann, at miðfyrisitingin tá ikki minkar tilsvarandi aftur, sum Vilhelm Johannesen fíggjarnevndarlimur herfyri vísti á í tinginum.

Vit eru í dag vitni til eina sera óhepna gongd, har stovnarnir eftirlýsa skrivaðum mannagondum frá miðfyristingini, hóast tað átti at verið beint øvugt eftirsum serfrøðin sjálvsagt er úti á teimum stovnum, ið tæna borgarnum. Er serfrøðin ikki tættast borgarnum, so stendur illa til.

Bygnaðurin má endurskoðast sum skjótast, soleiðis at vit fáa ein bygnað, ið hóskar til føroysk viðurskifti og merkir hetta, at ótálmaði vøksturin og centraliseringin seinastu árini má steðgast.

Tungu miðsavnaðu mannagongdirnar og eykajáttanir í hópatali mugu fáast burtur. Ein almennur bygnaður, ið nøktar borgarans tørv út í odd og egg má skipast, har heimild og ábyrgd fylgist, og har avgerðirnar verða tiknar so nær borgaranum sum møguligt. Miðfyristingin eigur at verða ráðgevandi og einans fáast við yvirornaði mál. Um so er, at miðfyrisitingin skal fortelja stovnum hvussu skip skulu leigast og um hesi skulu hava surringarmøguleika ella ikki, so er okkurt rívandi galið við skipanini.

Óansæð hvussu gott fólkið er, so verður skipanin ikki góð nokk uttan ein góðan bygnað.

Vónandi verður ikki neyðugt at hava hetta málið í nakrari valskrá til næsta val.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Semi-intellektuellur hissigproppur

**Páll Poulsen**



### Góði Kim

Í Fregnum fríggjadagin stóð ein grein: »Burturgingin við baljuni«. Høvundurin kallast Kim Simonsen, tað er hon sum er grundarlagið undir tí, sum eg kalli »semi intellektuelthudibras«.

Í hesi grein ger tú eystur-ríkaran, Wittgenstein, til týskara. Hann sum plágar tínar »sublimu« tankar, sum Hanus óivað hevði kallað tað. Makan til sjálvhátíðarligt tvass, skal man leita leingi eftir.

At tú og onnur fróðskapa tykkum, uttan nærri grundgevingar, men eittans við superfisiellum »namedropping«, skal eg við hesum eisini royna at prógva.

Tað sum eg meini við tjóðskaparrørsluni, er at hon fór yvir í eina politiska fasu um aldarskiftið, og eg síggi ikki nakrastaðni í rúgvuni av greinum hjá tær, at Ernest Gellner er settur í hugsaðan ella eftirprøvaðan samanhang. Hvar hevur tú roynt hann á tjóðskaparsøguna í Føroyum?

Her skal undirstrikast viðgera, ikki bert leystliga nevna og koma við bøvli hjá eittnú Uffa Østergaard. Tað einasta áhugaverda við Østergaard er »Que-est-cequ´une« nation hjá Renan.

Østergaard kundi heldur tikið sær av tí servila partinum av Danmarkar søgu, t.d. frá 1940 – 45.

Viðvíkjandi tí heimliga, var bert undirstrikað, at okkara høvuðsstaðar receptorar uppfata tað staðbundna um Strendur. Á fróðarmáli teir kalla. At Kimmurin ætlar sær at prógva okkurt, hvat tað so enn er?

At hála William Heinesen burturúr donsku bókmentasøguni, haðan hann hoyrir heima, var ákæran.

Nú haldi eg Dimmalætting á Alnótini og frálíka leitiskipanin útvegaði mær prógv fyri, at William Heinesen var komin til heiðurs og æru tí Marnersdóttir hevði viðgjørt hann í føroyskum jørðildi.

Sambært Bergi Hansen. Jústinus Ejdesgaard skrivaði: »Sum skrivandi maður«, í nekrologinum. Er tað ikki rørandi.

Eg skrivaði Wittgenstein í leitaskipanina á Dimmalætting, og minst 6 greinar hjá Kim Simonsen komu raplandi út. Mær nýtist ikki skeið í kjakmentan allar minst retorikki, men minst nú til, at tær nýtist einki at siga, um eingin meining er í tekstligum høpi.

Annars havi eg ikki eyknevnt nakran, eg dugi bara at benda.

Her eru nøkur dømi úr greinasavni Kimmar: »Ein modernað tjóðarbygging má royna at taka einstaklingin í álvara«, sent í Skáan 8. apríl, her tilskilar tú ikki hvør ið brúkar orðið »Nation Building«. Hvussu kann lesarin vita at tað er Harra Kim sum plagierar Andersson, ella um tað er Harra Kim. Hví eftirprøvar tú ikki »Imagined communities« á t.d. Strendur, Skálafjørðin, Eysturoynna, Føroyar ella Eivind? Name-dropping is too easy. Hósdagin 18. apríl tosar tú um tjóðarbygging, hvat tosar tú um? Hvat veit lesarin um at Kim hevur frá Gellner ella ikki. Hatta er ov bíligt.

14. mai stendur at: »Í dagsins politikki kenna vit hetta, har m. a. Høgni Hoydal í bók síni setir á hesa leið og roynir at endurskapa eina hugmynd av einum søguligum felagsskapi«. Púrasta tikin úr leysum lofti. Her eru eingi argument, bert intellektuell hugmóð.

15. apríl leggur tú H. J. Debes undir ákæruna »Áhugavert er at síggja Hans Jacob Debes fara ígjøgnum verk eftir Niels Winther og Jóannes Patursson við so óvanliga lítlum atfinningarsemi sum hann hevur ímóti eitt nú t. d. Andrassi Samuelsen«. Hvat meinar tú við? Nevn nøkur dømi?

11-11-2001 nevnir tú »sprogspøl« Wittgensteins. Hvat er tað í etymologiskum høpi?

Og »statsvaldið« á Debesartrøð, hvat er hetta fyri konspiratiónsteori? Hava teir stovnsett føroyska loyniløgreglu, sum hevur avlurtað øll hesi meinlíku nýyrðini, við framkomnari ljóðfrøði?

Álvaratos, Harra Kim, hvat er tað tú vil prógva, ella verifisera?

# Børn og óvirkin royking

Fyribyrgingarráðið, í samstarvi við Klaksvíkar Býráð seta í gongd eina verkætlan um roykfrí heim sum teirra partur av ætlanunum fyri tiltøkum Altjóða Tubbaksfría Dagin.

Tá ið tú keypir á einum av apotekunum 28. – 31. mai, fært tú eitt ókeypis borðskelti, sum tú kanst nýta at gera heim títt roykfrítt 31. mai. Roykfrí heim verja heilsuna hjá øllum, men serliga hjá børnunum.

Smá børn eru serliga viðkvom fyri óvirknum (passivum) royki, tí:

Tey anda meira luft lutfalsliga til kroppsvektina (og upptaka á sama stigi meira tubbaksroyk) og tey eru verri før fyri at gremja seg (antin tí tey eru ov ung, ella tí teirra klaga verður skúgvað til viks). Teirra órinskipan er minni verjandi, og tey eru verri før fyri at flyta seg burtur frá ávirkanini.

Óvirkin roykur er høvuðsorsøkin til nógvar barnasjúkur. Kortini vísa kanningar, at upp til 85% av vaksnum, sum roykja og liva saman við einum barni, ikki tryggja sær, at barnið ikki verður útsett fyri royki frá teirra sigarettum. Óvirkin royking er kend fyri at elva til millumoyrabruna, astma, bronkitis, hosti og lungnaskaða hjá børnum.

Granskarar hava ikki fyrr enn nýliga viðurkent álvaran av skaðanum, sum børnini hava fingið av tubbaksroyki. Nógv foreldur og ansingarfólk eru ikki enn vitandi um tær nógvu sjúkurnar, royking førir við sær. Summi av teimum halda, at lata tey vindeyga upp ella roykja í einum øðrum rúmi, so er vandin burtur.

Hygg eftir fleiri upplýsingum um óvirkna royking á baksíðuni á borðskeltinum.




**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Føroya Lívstrygging:

# Noyddist at taka av uppsparing

**Gongdin á altjóða virðis- og partabrævamarknaðinum gjørdi, at Føroya Lívstrygging í 2001 máttu taka nakað væl av uppspardum peningi. Eingin vandi er tó á ferð, sigur Tummas Eliasen, stjóri**

TRYGGING
*Heri á Rógvi*

Flest øll kenna søguna úr halgubók um tey sjey góðu og tey sjey raku árini. Tað gjørdist neyðugt hjá Moses og hinum at savna saman í goymslur tey raku árini, soleiðis at nokk var at taka av, tá ringu tíðirnar komu.

Hjá Føroya Lívstrygging hava tey eisini spart saman hesi seinastu árini. Tey hava seinastu árini forvunnið nógvan pening uppá kursvinningar á altjóða partabrævamarknaðinum. Partar av hesum forvunna peningi verður koyrdur í ein grunn kallaður bonusútjavningargrunnurin. Hjá Føroya Lívstrygging gjørdist tað neyðugt at stinga hondina nakað væl niður í grunnin eftir peningi, tí úrslitið á altjóða virðis- og partabrævamarknaðinum gjørdist vánaligt fyri 2001.

– Vit koyra við einari garanteraði rentu. Tí hava vit savnað saman í grunn í fleiri ár, tá vit hava havt kursvinning, sigur Tummas Eliasen, stjóri fyri Føroya Lívstrygging.

Fram til 2000 hevur Føroya Lívstrygging garanterað eina rentu aljóðandi 4,5%, og frá 2000 hava teir garanterað 2,5%.

Í alt varð neyðugt at taka 56,3 mió úr bonusútjavningini. Tryggingartakararnir fingu í 2001 tilskrivaða eina rentu upp á 7% p.a.

Tummas Eliasen vil tó ikki heilt kalla árið ov vánaligt.

– Hetta skal eisini síggjast í ljósinum av, at vit hava havt vinning í nógv ár. Vit koyra í einari tryggari legu. Samanborið við donsk feløg er okkara støða rættiliga góð.

Úrslitið av partabrøvunum gjørdist tó vánaligt, men hetta er bert ein partur av virkseminum, sigur Tummas Eliasen.



*Tummas Eliasen, stjóri fyri Føroya Lívstrygging, heldur ikki, at nakar vandi er á ferð fyri Føroya Lívstrygging, hóast felagið mátti eftir uppspardu peningi fyri at standa ímóti tapi*
*Mynd: Finnur Justinussen*

### Rakstrarúrslit

Rakstrarúrslitið hjá P/F Føroya Lívstrygging fyri árið 2001 var 4,3 mió. kr. mótvegis 4,5 mió. kr. í árinum 2000. Raksturin hjá P/F Føroya Lívstrygging var í 2001 merktur av tí vánaligu gongdini á altjóða fíggjarmarknaðinum, serstakliga lækkaði kursurin á partabrøvum nógv, og tað hevði við sær lutfalsliga stór kurstap. Tær samlaðu rentuinntøkurnar vóru 63,8 mió.kr. mótvegis 59,6 mió. kr., og samlaða kurstapi var 35,7 mió. kr. Soleiðis vóru nettointøkurnar av fíggjarognunum 28,0 mió. kr., og tað svarar til eitt miðalavkast av fíggjarognunum í 2001 upp á 1,9% mótvegis 5,0% árið fyri.

Við atlitið at, at árið 2001 ikki gav tað stóra avkastið, og at rentan sum heild hevur verið sera lág í langt tíðarskeið, er rentan fyri 2002 sett til 5,75% p.a.

Mannagongdin hevur higartil verið tann, at rentan hevur verið ásett fyri eitt ár í senn, men við atliti at gongdini á fíggjarmarknaðunum seinasta árið, verður hædd tikin fyri, at rentan kann lækkast í árinum.

Tryggingargjøldini øktust við 5,3% til 121,7 mió. kr. mótvegis 115,6 mió. kr. í 2002. Tey seinastu 5 árini er tryggingargjaldið hækkað úr 61,7 mió. kr. til 121,7 mió. kr., svarandi til ein árligan vøkstur upp á 19,5%.

P/F Føroya Lívstrygging hevði aðalfund tann 2. mai. Nevndin varð øll afturvald, og í henni sita Poul Hansen, Súsanna E. Sørensen, Allan T. Skaalum, Eyðbjørg Kass og Gunnar Holm-Jacobsen.

Jóannes Eidesgaard:

# Hava skipað valbólk við sambandið

**Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava skipað valbólk til tingfundin í dag. Jóannes Eidesgaard heldur, at løgmaður allatíðina hevur viljað skipað hesa samgonguna, og ikki hevur givið breiðu samgonguni nóg stóran ans**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Nú Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin eftir øllum at døma eru endaði aftur í andstøðu, so hava flokkarnir eisini skipað valbólk til nevndarvalini.

Hetta váttar Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sum kallar tað eina sjálvfylgju, at teir skipa seg í valbólk, tá teir eru riknir út í andstøðu.

Av teimum 45 nevndarsessunum í løgtingsnevndunum fær andstøðan 21.

Jóannes Eidesgaard hevur áður víst á, at tað er undrunarvert, at løgmaður, sum hevur tosað nógv um eina breiða samgongu, bert hevur nýtt fimm samdøgur til at royna hesa.

– Tað tykist sum um, at hann hevur viljað hetta allatíðina, og hann hevur roynt at fingið ryggin frían við øðrum samráðingum, sigur Jóannes Eidesgaard, ið als ikki er bilsin um, at samráðingarnar hava gingið so væl millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Miðflokkin.

Sjálvur royndi formaður Javnaðarfloksins eisini at loysa knútin, sum gjørdi enda á samráðingunum millum Javnaðarflokkin og sitandi samgongu. Hann fór við einum uppskoti til Anfinn Kallsberg, løgmann. Løgmaður gjørdi – sambært Jóannes Eidesgaarrdeinki meira við málið.

Jóannes Eidesgaard vil tó ikki siga nakað um, hvat hetta uppskotið innihelt. Tó vil hann siga, at Javnaðarflokkurin flutti seg nógv við uppskotini, men kortini fekk tað ongan týdning.

### 10 ár

Nú tað er líkt til, at Javnaðarflokkurin eisini eftir hetta valið er endaður í andstøðu, so kann tað gerast tíggju ár, ið Javnaðarflokkurin hevur sitið í andstøðu, um samgongan heldur á í fýra ár.

– Tað er strævið at vera í andstøðu. Vit mugu eisini til at gera eitt sindur av sjálvrannsakan. Bæði eg persónliga og flokkurin. Hetta gevur okkum nakað at hugsa um, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur seg vera sannførdan um, at tað ikki er politikkurin hjá flokkinum, sum hevur skyldina í, at teir eru aftur endaðir í andstøðu.

– Tað eru onkrir flokkar, sum ikki vilja, sigur Jóannes Eidesgaard.

Samráðingarnar við sitandi samgongu upplivdi Jóannes Eidesgaard sum seriøsar samráðingar, men talan gjørdist kortini ongantíð um veruligar samráðingar við Sambandsflokkin ístaðanfyri Tjóðveldisflokkin.

Hann leggur afturat, at tað má vera enn meira skuffandi fyri Sambandsflokkin, sum gjørdist størsti flokkur á valinum, nú aftur skula sita í andstøðu.



*– Tað er tó rímiligt, at júst somu flokkar, sum hava gjørt hesa niðurskurðir í blokkinum, sleppa at rudda upp hjá sær sjálvum, sigur Jóannes Eidesgaard*

### Rudda upp

– Tað er tó rímiligt, at júst somu flokkar, sum hava gjørt hesa niðurskurðir í blokkinum, sleppa at rudda upp hjá sær sjálvum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Eisini heldur Jóannes Eidesgaard, at talan er um eitt kraftigt høgra-rák.

– Tað er ikki bara her hjá okkum, men í øllum Evropa, at vit síggja eitt kraftigt høgra rák. Tað gongur eisini gott í Føroyum, og tílík rák koma ógvuliga oftani í góðum tíðum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann roknar við, at nógvar av orðingunum og ætlanunum í samgonguskjalinum kundi Javnaðarflokkurin havt tikið undir við, men tað skuldi so ikki vera Javnaðarflokkurin, sum endaði í samgongu.